**Fiskimálaráðið**

**Løgtingið**

Dagfesting: 19. februar 2018
Mál nr.: 18/00040-2
Málsviðgjørt: HD/KM

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi

(Tillagingar, rættingar og fylgibroytingar)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 1, nr. 13 verður “, royndarfiskiskap og menningarætlanir” broytt til: “og royndarfiskiskap”.

**2.** § 3, stk. 1, nr. 20 verður orðað soleiðis:
“20) Sølukvota: Nøgd av heildarkvotu ella fiskidøgum, sum er boðin út á uppboði. Sølukvota verður latin keypara sum stutttíðar rættindi fyri eitt fiskiár í senn, miðallong rættindi fyri trý fiskiár í senn ella langtíðar rættindi fyri átta fiskiár í senn. Rættindi, latin sum sølukvota, verða altíð boðin út av nýggjum árið eftir, at tey ganga út.”

**3.** § 3, stk. 1, nr. 21 verður orðað soleiðis:
“21) Uppboðsárskvota: Nøgd av heildarkvotu ella fiskidøgum, ið verður boðin út, men ikki er sølukvota. Uppboðsárskvota verður latin sum stutttíðar rættindi fyri eitt fiskiár í senn.”

**4.** Í § 7, stk. 3 verður “og menningarætlanir” strikað.

**5.** Í § 14, stk. 3, nr. 1 verður “9.600 tons” broytt til: “12.800 tons”.

**6.** Í § 14, stk. 3, nr. 2 verður “4.440 tons” broytt til: “7.107 tons”.

**7.** Í § 23, stk. 2 verður “, royndarfiskiskap og menningarætlanir” broytt til: “og royndarfiskiskap”.

**8.** Í § 37, stk. 2 verður “gera nærri reglur” broytt til: “áseta nærri treytir”.

**9.** Í § 41, stk. 1 verður “undantikin veiðirættindi, latin útróðrarbátum sambært § 26, nr. 3,” strikað.

**10.** Í § 41 verður aftan á stk. 6, sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 7*. Brúksskyldan, sambært stk. 1 og 2, fevnir ikki um rættindi latin útróðrarbátum sambært § 27, nr. 3 og onnur rættindi latin hesum bátum, rættindi keypt á uppboði sambært §§ 14-18 undantikin.”

**11.** § 42, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Egin kvotupartur ella egin árskvota kann avhendast fyri eitt ár í senn ella endaliga til persón ella felag, ella eigara av fiskifari, sum lýkur treytirnar í §§ 5-7 og 9-10 eftir reglunum í hesi grein. Avhending kann bert fara fram, um rættindahavari, ið avhendir, fiskiárið frammanundan hevur havt egna árskvotu av fiskaslagnum, ið ætlanin er at avhenda sambært hesi grein, og hevur gagnnýtt í minsta lagi 60% av hesi kvotu. Endalig avhending er ikki loyvd í 2018. Móttakarin yvirtekur tað avhendað við teimum rættindum og skyldum, sum fylgja av egna kvotupartinum ella egnu árskvotuni.”

**12.** Í § 43, stk. 1 og 2 verður “§§ 6, 7, 9 og 10” broytt til: “§§ 5-7 og 9-10”.

**13.** Í § 49, stk. 1 verður “, gjørd upp 4. hvønn mánað fyri hvønn fiskiskap ella fiskaslag sær sama tíðarskeið,” strikað, og “skulu” verður broytt til: “skal”.

**14.** § 49, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá kravinum í stk. 1 og ásetir nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur eru fevnd av kravinum sambært stk. 1.“

**15.** § 49, stk. 4 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 4.* Er veiða landað uttanlands í ósamsvari við stk. 1 og 2, skal eigarin av fiskifarinum rinda eitt gjald til landskassan, sum samsvarar við 30% av søluvirðinum av tí nøgd, sum er avreidd uttanlands.”

**16.** § 50, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Í minsta lagi 25% av allari veiðu hjá føroyskum fiskifari, gjørd upp fyri tíðarskeið, sum landsstýrismaðurin ásetir, skulu bjóðast út um góðkenda uppboðssølu í Føroyum.”

**17.** § 50, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera undantak frá kravinum í stk. 1 og áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg ella fiskaúrdráttir eru fevnd av kravinum sambært stk. 1.”

**18.** § 51, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Áðrenn fiskiloyvi verður latið, skal tann, sum søkir um fiskiloyvi, vátta, at skipari og manning á fiskifari í tí ávísa fiskiskapinum verða lønt samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg. Er ávísur fiskiskapur ikki fevndur av sáttmálum við føroysk manningarfeløg, skal tann, sum søkir fiskiloyvi, í hvørjum einstøkum føri vátta, at lønarviðurskiftini hjá skipara og manning eru staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum, sum ávíst í fiskiloyvinum.”

**19.** Í § 63 verður aftan á “§ 51, stk. 1” sett: “og 2”.

**20.** Í § 76, stk. 1 verður 2. pkt strikað.

**21.** § 79, stk. 3, 2. pkt, verður orðað soleiðis:
“Tó er ikki loyvt at avhenda fiskidagar í bólki 4 A og bólki 4 B til bólk 4 T.”

**22.** Í § 81, stk. 1, nr. 1 verður aftan á “§ 51, stk. 1” sett: “og 2”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**1.1. Orsøkir til uppskotið**
Lógin um fyrisiting av sjófeingi varð samtykt og lýst í desember og kom í gildi 1. januar 2018. Orsøkin til, at uppskot nú verður lagt fram um at broyta ásetingar í lógini er, at tørvur er á at nágreina og rætta onkrar orðingar í lógartekstinum. Talan er ikki um innihaldsligar broytingar, men um tekniskar tillagingar og rættingar, fyri at gera lógartekstin greiðari fyri borgara og umsiting.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Staðfest er, at í verandi lógarteksti er neyðugt at gera ávísar tillagingar og rættingar fyri at fáa ásetingarnar greiðari og neyvari. Tað vísir seg, at í summum førum er okkurt komið skeivt fyri, eitt nú so at ásetingarnar ikki samsvara við upprunaligu ætlanina. Í øðrum førum eru orðingar ikki nóg neyvar og greiðar at umsita eftir. Aðrastaðni eru dømi, at tá einstakar ásetingar eru broyttar, eftir at uppskotið varð lagt fram í Løgtinginum, so er hetta gjørt, uttan at neyðugar fylgibroytingar eru gjørdar í øðrum greinum.

Hetta ger samanumtikið, at lógarteksturin ikki altíð hongur nóg væl saman, eins og summar lógargreinar eru orðaðar á ein hátt, sum ger tær torskildar, bæði fyri borgaran og tey, ið skulu umsita lógina.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at gera tekniskar broytingar og tillagingar í lógini um fyrisiting av sjófeingi, so at orðingarnar eru neyvari og greiðari fyri borgara og umsiting.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið ber í sær umorðingar og rættingar av tekniskum slagi, sum ikki ávirka innihaldið og upprunaligu ætlanina við ásetingunum. Mett verður, at við teimum broytingum, ið eru skotnar upp, verða ásetingarnar neyvari og greiðari fyri borgaran, eins og tær eru við til at lætta um umsitingina.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er sent til ummælis hjá:

Fiskivinnuráðnum
Vørn
Felagnum Trolbátar
Stjórnarráðunum

Harumframt er uppskotið lagt út til hoyringar alment á síðuni www.foroyalandsstyri.fo.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Uppskotið verður tó mett at stuðla undir, at lógin verður lættari at umsita.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Ásetingin í uppskotinum, sum greiðari tilskilar, at øll rættindi hjá smærru útróðrarbátunum eru undantikin brúksskylduni, lættir um skyldirnar hjá hesum partinum av flotanum.

Samanumtikið verður mett, at broytingarnar í hesum uppskoti, hvørs endamál er at gera regluverkið greiðari og neyvari, sum heild eisini gagnar vinnuni.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur sosialar ella aðrar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at tað eru bindingar í millumtjóðasáttmálum, sum gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, herundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Marknaforðingar
Mett verður ikki, at hetta uppskotið elvir til marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting ella sektir.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

**Til nr. 1**

*§ 3, stk. 1, nr. 13)*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð orðið “menningarætlan” strikað í grein 6, stk. 3 og í grein 58, stk. 1, tí mett var, at orðið kann koma í bland við hugtøkini, ið eru í ásetingini um menningarkvotur í grein 60 og harvið skapa ógreiðu. Mett verður, at tað ikki var tilætlað, at “menningarætlan” ikki samstundis bleiv strikað í øðrum ásetingum í løgtingslógini. Tí verður orðingin strikað í allýsingini í grein 3, stk. 1, nr. 13 av hugtakinum heildarkvota, eins og í grein 7, stk. 3 og grein 23, stk. 2.

**Til nr. 2 og 3**

*§ 3, stk. 1, nr. 20 og 21)*
Allýsingarnar av hugtøkunum sølukvota og uppboðsárskvota verða nágreinaðar, so at tær eisini fevna um fiskidagar, ið heimild er at bjóða á uppboð eftir ásetingunum í greinunum 16 til 18 í lógini. Broytingin hevur ikki praktiskar avleiðingar við sær.

**Til nr. 4**

*§ 7, stk. 3*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð orðið “menningarætlan” strikað í grein 6, stk. 3 og í grein 58, stk. 1 tí mett var, at orðið kann blandast við hugtøkini, ið finnast í ásetingini um menningarkvotur í grein 60 og harvið skapa ógreiðu. Mett verður, at tað ikki var tilætlað, at “menningarætlan” ikki samstundis bleiv strikað í øðrum ásetingum í løgtingslógini. Tí verður orðingin eisini strikað í grein 7, stk. 3 viðvíkjandi ognarviðurskiftum.

**Til nr. 5 og 6**

*§ 14, stk. 3*
Í álitinum hjá Løgtingsins vinnunevnd í sambandi við viðgerðina av uppskoti til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi í Løgtinginum (løgtingsmál nr. 18/2017) setti minnilutin fram uppskot um at broyta grein 14, stk. 1, soleiðis at nøgdirnar í ásetingunum nr. 1-2 vórðu broyttar frá ávikavist 7.200 tonsum av toski á landgrunninum í føroyskum sjógvi til 9.600 tons av toski á landgrunninum í føroyskum sjógvi og frá 3.330 tonsum av hýsu í føroyskum sjógvi til 5.330 tons av hýsu í føroyskum sjógvi. Broytingaruppskotið varð samtykt. Nøgdirnar í grein 14, stk. 3 vórðu tó ikki broyttar samsvarandi broytingunum í grein 14, stk. 1. Mett verður, at tað ikki var tilætlað, at neyðugar fylgibroytingar ikki vórðu gjørdar. Tí verður skotið upp at broyta nøgdirnar í ásetingunum í stk. 3, nr. 1-2, soleiðis at orðingin í stk. 3, nr. 1, 9.600 tons av toski á landgrunninum í føroyskum sjógvi, verður broytt til 12.800 tons av toski á landgrunninum í føroyskum sjógvi, og stk. 3, nr. 2 verður broytt frá 4.440 tonsum av hýsu í føroyskum sjógvi til 7.107 tons av hýsu í føroyskum sjógvi.

**Til nr. 7**

*§ 23, stk. 2*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð orðið “menningarætlan” strikað í grein 6, stk. 3 og í grein 58, stk. 1, tí mett var, at orðið kann blandast við hugtøkini, ið finnast í ásetingini um menningarkvotur í grein 60 og harvið skapa ógreiðu. Mett verður, at tað ikki var tilætlað, at “menningarætlan” ikki samstundis bleiv strikað í øðrum ásetingum í løgtingslógini. Tí verður orðingin eisini strikað í grein 23, stk. 2 um kvotuskipan fyri veiðu við troli og fyri veiðu við línu.

**Til nr. 8**

*§ 37, stk. 2*
Heimildin til landsstýrismannin at gera nærri reglur viðvíkjandi umskiping, virking umborð o.a. verður broytt til, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri treytir. Við hesi broyting samsvarar ásetingin við upprunaligu viðmerkingina til greinina, sum m.a. nevnir, at um landsstýrismaðurin velur at geva loyvi til ávíst virksemi í føroyskum sjógvi við førum undir

fremmandum flaggi, kunnu treytir setast við. Verandi orðing kann skiljast sum, at kunngerð skal gerast, fyri at treytir kunnu setast. Hetta var ikki ætlanin.

**Til nr. 9 og 10**

*§ 41, stk.1 og 7*
Skotið verður upp at broyta orðingarnar í hesi grein, so at tað er greitt ásett, at øll fiskirættindi hjá smábátum eru undantikin brúksskylduni. Sum greinin nú er orðað, er tað bert í fiskidagaskipanini, at smábátarnir eru undantiknir brúksskylduni (grein 41, stk. 1).

Ætlanin hevur alla tíðina verið, at brúksskylda ikki skal vera knýtt at veiðirættindinum hjá smærri útróðrarbátunum í bólki 5 yvirhøvur.

Tí verður skotið upp at broyta § 41, soleiðis at tað greitt er ásett, at brúksskyldan er galdandi fyri øll rættindi hjá smærri útróðrarbátunum í bólki 5. Tað við siga ikki bert um rættindi í fiskidagaskipanini, men eisini rættindi, ið verða latin smærru útróðrarbátunum undir øðrum skipanum. Dømi um onnur rættindi, latin smábátum, er loyvið at veiða hummara í føroyskum sjógvi, sum er skipað við kvotum. Á summum sundum og firðum verða hesi rættindi latin bátunum sum egnar árskvotur.

Reint tekniskt verður hetta gjørt við at broyta § 41, stk. 1 og seta inn eitt nýtt stk. 7, sum undantekur rættindi hjá smábátum frá brúksskylduni. Brúksskyldan er tó framvegis galdandi fyri fiskirættindi, ið eru keypt á uppboði sambært greinunum 14-18 í lógini.

**Til nr. 11**

*§ 42, stk. 1, 1. pkt.*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð sett inn ein nýggj orðing í § 5 í lógini, har tað var ásett, at fyri at bjóða upp á rættindi at veiða, at hava ræði á rættindum at veiða ella at gagnnýta rættindi krevst, at persónurin ella felagið hevur góðkenning frá landsstýrismanninum til at reka virksemi innan fiskivinnu. Henda broyting átti samstundis at ført við sær broyting í grein 42 um avhending av kvotum, soleiðis at tað greitt framgongur, at persónur ella felag, ella eigari av fiskifari, sum móttekur tað avhendað, umframt treytirnar í greinunum 6, 7, 9 og 10, eisini skal lúka treytina í grein 5. Tí verður grein 5 við hesum sett inn í grein 42, stk. 1, 1. pkt.

*§ 42, stk. 1, 2. pkt.*
Sum ásetingin nú er orðað, kann hon skiljast soleiðis, at avhending av kvotum er treytað av, at í minsta lagi 60 prosent av øllum kvotunum viðkomandi rættindahavari hevur ræðið á, fiskiárið frammanundan eru nýtt til fiskiskap, og ikki bara av tí kvotu og fiskaslagi, sum ætlanin er at avhenda. Hetta var ikki tilætlað. Ásetingin verður tí við hesum uppskotinum nágreinað soleiðis, at avhending í einum fiskiári er treytað av, at tann, ið avhendir, fiskiárið frammanundan hevði egna árskvotu av fiskaslagnum, ið ætlanin er at avhenda, og at tann, ið avhendir, hevur gagnnýtt í minsta lagi 60 prosent av hesi kvotuni fiskiárið frammanundan.

**Til nr. 12**

*§ 43, stk. 1 og 2*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingslóg nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð sett inn ein nýggj orðing í § 5 í lógini, har tað var ásett, at fyri at bjóða upp á rættindi at veiða, at hava ræði á rættindum at veiða ella at gagnnýta rættindi krevst,

at persónurin ella felagið hevur góðkenning frá landsstýrismanninum til at reka virksemi innan fiskivinnu. Henda broyting átti samstundis at ført við sær broyting í grein 43 um avhending av fiskidøgum, soleiðis at tað greitt framgongur, at avhendast kann til persón ella felag, sum lýkur treytirnar í greinunum 6, 7, 9 og 10 umframt nýggju treytina í grein 5. Tí verður grein 5 við hesum sett inn í grein 43.

**Til nr. 13**

*§ 49, stk. 1*
Í álitinum hjá Løgtingsins vinnunevnd í sambandi við viðgerðina av uppskoti til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi í Løgtinginum (løgtingsmál nr. 18/2017) setti minnilutin fram uppskot um at broyta § 49, stk. 1, soleiðis at øll veiða, og ikki 75% av allari veiðu, sum upprunaliga ásett, skuldi vera fevnd av kravinum um landing um bryggjukant í Føroyum. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Tá kravið er, at øll veiða skal landast, er ikki neyðugt við ásetingum um tíðarskeið, har veiðan verður gjørd upp. Tí verður tilvísingin til 4. hvønn mánað og heimildin hjá landsstýrismanninum í serligum førum at brúka annað tíðarskeið fyri uppgerð strikað.

**Til nr. 14**

*§ 49, stk. 2*
Í álitinum hjá Løgtingsins vinnunevnd í sambandi við viðgerðina av uppskoti til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi í Løgtinginum (løgtingsmál nr. 18/2017) setti minnilutin fram uppskot um at broyta § 49, stk. 2, soleiðis at heimild var fyri at gera undantak frá ásetingini í stk. 1, tá talan er um force majeure líknandi støður, t.d. um talan er um motorbrek. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Mett verður, at landsstýrismaðurin eigur at hava heimild til at gera undantak, eisini í støðum, tá talan ikki er um force majeure líknandi støður. Dømi um slíka støðu kann vera, at móttøkuorkan á landi í Føroyum er ein fløskuhálsur. Tí verður ein nýggj orðing gjørd av grein 49, stk. 2, soleiðis at landsstýrismaðurin hevur eina breiðari heimild til at geva undantak frá kravinum um, at at øll veiða skal um bryggjukant í Føroyum.

Ásetingin um, at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur eru fevnd av kravinum sambært stk. 1 er óbroytt.

**Til nr. 15**

*§ 49, stk. 4*
Í álitinum hjá Løgtingsins vinnunevnd í sambandi við viðgerðina av uppskoti til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi í Løgtinginum (løgtingsmál nr. 18/2017) setti minnilutin fram uppskot um at broyta § 49, stk. 1, soleiðis at øll veiða, og ikki 75% av allari veiðu, sum upprunaliga ásett, skuldi vera fevnd av kravinum um landing um bryggjukant í Føroyum. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Í sambandi við broytingina varð § 49, stk. 4 tó ikki broytt. Talan er um samantengdar ásetingar, tí endamálið við § 49, stk. 4 er, at veiða, sum, í ósamsvari við ásetingina í stk. 1, verður landað uttanlands, skal áleggjast eitt gjald. Lagt verður tí upp til, at orðingin, “sum fer upp um 25%” í § 49, stk. 4, verður strikað, soleiðis at gjaldið til landskassan eisini tekur støði í allari veiðuni, sum verður landað uttanlands.

**Til nr. 16**

*§ 50, stk. 1*
Sambært núgaldandi § 50, stk. 2 hevur landsstýrismaðurin heimild at áseta nærri reglur um, hvussu og nær veiða og søla, sambært stk. 1, verður gjørd upp. Tørvur er at nágreina hesa heimild, og skotið er tí upp at broyta § 50, stk. 1, 1. pkt. soleiðis, at landsstýrismaðurin kann býta árið upp í tíðarskeið, har kravið um uppboðssølu á 25% skal vera lokið.

**Til nr. 17**

*§ 50, stk. 2*
Sambært núgaldandi áseting kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg ella fiskaúrdráttir eru fevnd av kravinum um, at 25% av veiðuni skulu bjóðast út um góðkenda uppboðssølu. Skotið verður upp at broyta ásetingina soleiðis, at landsstýrismaðurin fær eina breiðari heimild at gera undantak frá kravinum um uppboðssølu í stk. 1.

Mett verður, at landsstýrismaðurin eisini eigur at hava heimild til at gera undantak frá kravinum um uppboðssølu – í einstøkum førum og generelt – um atlit at keypara, seljara og/ella atlitið at røkka endamálinum við ásetingini talar fyri hesum.

Skotið er eisini upp at strika síðsta punktum í hesi áseting, sum gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um uppgerð av veiðu og sølu sambært stk. 1, og er henda áseting nágreinað og sett inn í stk. 1, 1. pkt.

**Til nr. 18**

*§ 51, stk. 2*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, kom áseting inn um, at fiskiloyvið er treytað av, at ávísur fiskiskapur skal vera beinleiðis fevndur av sáttmálum við føroysk manningarfeløg. Um so er, at fiskiskapurin ikki er fevndur av tílíkum sáttmála, skulu lønarviðurskiftini hjá skipara og manning í hvørjum einstøkum føri vera staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum, sum ávíst í fiskiloyvinum.

Fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá myndugleikanum, verður skotið upp at broyta ásetingina soleiðis, at útskriving av fiskiloyvi krevur váttan um, at tey í ásetingini nevndu viðurskifti eru í lagi. Tann, sum søkir um fiskiloyvi, skal fáa váttanina til vega og leggja hana fram í sambandi við umsókn um fiskiloyvi.

**Til nr. 19**

*§ 63*
Skotið verður upp, at grein 51, stk. 2, eins og grein 51, stk. 1, verður undantikin eftirlitsskylduni hjá fiskiveiðieftirlitinum. Hetta merkir, at fiskiveiðieftirlitið ikki skal hava eftirlit við, at skipari og manning á fiskifari í tí ávísa fiskiskapinum verða lønt samsvarandi sáttmálum við føroysk manningarfeløg ella, at lønarviðurskiftini hjá skipara og manning eru staðfest í skrivligari avtalu millum avvarðandi manningarfeløg og ábyrgdaran av fiskifarinum. Tó verður samstundis gjørd broyting í revsireglunum, soleiðis at brot á § 51, stk. 2 eisini verður fevnt av revsing, og ásetingarnar, sum snúgva seg um manningarviðurskifti, verða sostatt viðgjørdar eins.

**Til nr. 20**

*§ 76, stk. 1*
Skotið er upp at strika orðingina um, at heimilað er ikki at flyta loyvi ella avhenda fiskidagar frá fiskifari á annað fiskifar, sum hevur størri fiskiorku. Hendan broytingin hevur ongar praktiskar avleiðingar við sær, tí hesi viðurskifti eru skipað við ásetingunum í greinunum 77 og 79.

Grundin til uppskotið um at strika seinna brotið í § 76, stk. 1 er, at orðingin ikki heilt samsvarar við ásetingarnar í grein 79, sum snúgva seg um at avhenda fiskidagar. Grein 79 forðar ikki fyri at flyta fiskidagar á fiskifar, sum megnar at gagnnýta hvønn fiskidag effektivari enn eitt minni fiskifar. Men tá hetta verður gjørt, er treytin, at dagar at flyta verða umroknaðir á ein hátt, ið avspeglar lutfalsliga virðið á fiskidøgum millum ymisk fiskifør grundað á veiðievni. Tað vil siga, at verða dagar fluttir á eitt størri og effektivari fiskifar, vera dagarnir at flyta minkaðir, so at samlaða royndin í fiskidagaskipanini ikki gerst størri.

**Til nr. 21**

*§ 79, stk. 3, 2. pkt*
Skotið er upp at broyta orðingina í hesi grein, so at reglurnar um at avhenda fiskidagar, tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum, eru tær somu, sum vóru í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Ætlanin hevur ikki verið, at lógarkarmarnir um fiskidagaskipanina í 2018, skulu vera øðrvísi enn frammanundan. Men í verandi reglum um "3-mánaðar-regluna" er okkurt tó komið skeivt fyri, sum ger, at avmarkingarnar eru fleiri enn í gomlu lógini. Hetta verður við hesum uppskotinum rættað, so at reglurnar eru tær somu sum áðrenn 1. januar 2018.

Sostatt er høvuðsreglan framvegis, at fiskidagar ikki kunnu avhendast millum bólkarnar. Men, tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum, er tó loyvt at avhenda fiskidagar millum bólkarnar. Tó er bólkur 5 undantikin, eins og tað ikki er loyvt at avhenda fiskidagar til veiðu við húki í bólkunum 4A og 4B til trolbátar í bólki 4T.

**Til nr. 22**

*§ 81, stk. 1, nr. 1*
Í broytingaruppskotinum til 3. viðgerð av løgtingsmáli nr. 18/2017, uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, bleiv nýtt stk. 2 sett inn í § 51, men ongin revsing bleiv tengd at hesi áseting. Skotið verður tí upp at broyta revsireglurnar soleiðis, at brot á § 51, stk. 2 eisini verður fevnt av revsing.

**Til § 2**

Gildiskomuáseting.

Fiskimálaráðið, xx. februar 2018

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: